## Kavaroksstormur í USA og Kanada

Seinasta sunnudag rakti ein harður kavaroksstormur eystara part av Kanada og landnyrðingspartin av USA við kava og frosti. Onkustaðni á leiðini var lýggjari, og har var antin vátakavi ella regn. Nógvir bilar fóru út av vegunum, og hópur av trøum fullu til jarðar, tá ið klaki legðist á greinarnar. Fleiri hundrað fráferðir hjá flogfeløgum heilt úr Chicago til Montraal vórðu avlýstar, tá ið kavi legðist á breytirnar. Onkrastaðni í New York legðist kavin 30 centimetrar tjúkkur, og hópur av sethúsum og bygningum annars í Pennsylvania, New Jersey, Long Island og pørtum av Connecticut mistu streymin. Í New York City vórðu tey sum heild spard fyri streymslit, men máttu lata sær lynda nógvan krapa í gøtunum. Í Boston og pørtum av New England legðist eisini nógvur kavi, og veðurmenninir søgdu, at kavin saktans kundi gerast 50 sentimetrar tjúkkur á leiðini. Har luftin var lýggjari úti við strendurnar, og tað regnaði illa, væntaðu tey, at vátu vegirnir fóru at frysta til ís. Í kanadisku býunum Toronto, Montreal og Ottawa legðist kavin í støðum 40 sentimetrar tjúkkur. Seinasta sunnumorgun vóru 600 ferðsluóhapp bara í Toronto, og 100 fráferðir hjá flogfeløgum vórðu avlýstar í Montreal og Toronto. Út við ein miljón fólk mistu streymin í Oklahoma og Missouri, skrivar NTB.



# Einki røkist fyri loysn hjá fis

**Fiskiflotin liggur framvegis, og í løtuni røkist einki fyri, at nøkur loysn er í ljósmála í sáttmálatrætuni millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag. Einki formelt samband hevur verið millum partarnar, síðan samráðingarnar slitnaðu nakrar dagar fyri jól**

VERKFALL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um einki verkfall var í fiskiskipaflotanum, høvdu nøkur skip longu verið farin útaftur eftir jólahalguna.

Í fjør loystu eitt nú Polarhav og Stjørnan og Bakur og Stelkur longu 3. jóladag.

Leirvíkstrolararnir gjørdu ein rimmar túr og seldu fyri út við 2,4 miljónir krónur í Hanstholm. Polarhav og Stjørnan royndu á Munkagrunninum í hálvt fjórða samdøgur. Teir høvdu trolið úti 12 ferðir og fingu tilsamans 440.000 pund. Manningarparturin hendan túrin lá um 50.000 krónur.

Bakur og Stelkur gjørdu tveir góðar túrar um somu tíð, sum leirvíkstrolararnir gjørdu ein túr.

Tá ið Polarhav og Stjørnan komu aftur úr Hanstholm og løgdu til bryggju í Saltangará leygardagin 6. januar, komu Bakur og Stelkur aftur av øðrum túrinum.

### Flotin liggur

Nú sáttmálastríðið millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag endaði við verkfalli nakrar dagar fyri jól, hevur einki ísfiskaskip loyst eftir jólahalguna. Allur ísfiskaflotin liggur og einastu skip, sum kunnu hugsast at vera til fiskiskap undir Føroyum, eru skip, sum slett ikki hava verið í føroyskari havn, síðan Føroya Fiskimannafelag lýst verkfall.

Stutt fyri halguna var okkurt skip framvegis til fiskiskap, og ivasamt var, um teir fóru av landinum við fiskinum. Um veiðan er løgd upp uttanlands, er hugsandi, at skip eru farin beinleiðis aftur til fiskiskap, men um so er, hava menn eisini mist jólahalguna heima við hús.

Sosialurin hevur í morgun ringt til partarnar í sáttmálastríðnum, formannin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen og formannin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard. Vit hava eisini ringt til semingsmannin, Terja Sigurðsson.

Einasti av hesum, ið svaraði á telefonini, var Jan Højgaard.

- Einki formelt samband hevur verið millum partarnar, síðan samráðingarnar slitnaðu. Eg havi við eitt høvi møtt Vibergi Sørensen og óformelt læt eg hann vita, at vit eru til reiðar at samráðast, um Føroya Reiðarafelag heldur, at okkurt er at tosa saman um.

Jan Højgaard sigur, at einki formelt samband hevur verið millum feløginin, ei heldur millum Føroya Fiskimannafelag og semingsstovnin, síðan fiskiflotin varð lagdur.

- Vit hava landsfund í morgin, og síðan koma vit inn í vikuskiftið og nýggjárshalguna. Eg vænti tí ikki, at fiskiflotin loysir aftur í hesum árinum.

Hann væntar, at feløgini í fyrsta lagi fara at sessast aftur einaferð miðskeiðis í komandi viku, um partarnir tá meta, at okkurt er at tosa saman um.






*- Vit vilja ikki leingja sáttmálan í verandi líki. Vit hava havt ymisk uppskot um tillagingar og broytingar. Haraftrat kemur so spurningurin um eftirlønina, sum ongan veg er komin, sigur Jan Højgaard*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*